

*Svend Lützen, sonur Nichels og Sigrid*

Følgen blev, at han ogsaa maatte overgive sig i Dødens Hænder. Dette var en frygtelig ulykke.

**3. december**

Befandt mig nogenlunde godt hele Dagen. Efter Middag var Barberen hos mig og gav mig et grundigt Hovedbad. Siden klippede han mig. Det hele varede næsten en Times Tid.

Om Aftenen havde jeg besøg af Fr. Hedvig Restorff. Vi sad og passiarede "eina góða løtu."

**6. December**

Regnen styrtede ned hele Dagen igennem. Om Formiddagen kom en fransk Damper ind paa Reden, meget stor, skulde til Amerika.

Var oppe i godt to timers Tid. Befandt mig meget godt. Abbi var et øjeblik oppe hos mig. Johs og Súsanna maatte selvfølgelig hjælpe ham op og ned ad Trapperne.

**9. December**

Om aftenen Besøg af Just Jacobsen. Faster og Johs var i Selskab hos Hans Müller, (pápa Eiden.) "Abbi var so errin, meðan Júst var her, vildi endiliga hava hann at drekka eitt glas av víni við sær."

## Júst av Húsum

Júst var ein av teimum kendu havnarmonnunum frá hesi tíðini. Hann var ein teirra, sum kallaði inn til jólafundin í 1888, og hann var eisini tingmaður eitt skeið. Hann var av Húsum í Havn og var partur av grannalagnum, har Egil búði. Hann og hansara ættarfólk vitjaðu eisini javnan Egil.

Tí kann tað vera ein partur av hesi søgu at endurgeva burtur úr minningarorðum um Júst. Hann doyði í 1932, 72 ára gamal.:

"Júst dugdi jarnsmíð, og vit hava enn minnir um, tá hann og Rasmus Effersøe løgdu "hond og ond" saman til at gera nýggj landbúnaðaramboð.

Í teimum árum okkara fiskifloti fór at vaksa, og nógvir bóndir settu pening í skipakeyp, tók Júst bóndi eisini lut í hesum starvi og var í nøkur ár bæði eigari og reiðari av fiskiskipum. Hann fór tó burtur úr hesum starvi í góðari tíð og ivaleyst uttan peningaligt mein.

Starvsbrøður Júst bónda høvdu boð eftir honum til felagsvinnu í ymiskum málum. Hann var limur og í fleiri ár stjórnarlimur í Føroya Búnaðarfelag og fylgdi starvi tess við stórum ansi og ídni. Frá tí Streymoyar Rossafelag íbirtist og til sín deyðadag var hann formaður tess og gjørdi her eitt gott arbeiði undir truplum viðurskiftum.

Av Føroya Búnaðarfelag varð hann valdur í ymsar nevndir, og felagið kann fyri hansara starvi her og í stjórn felagsins siga honum sína bestu tøkk. Hann var góður maður at hava við í slíkum starvi. Júst var royndur maður, og hann var sakligur maður uttan baktankar.

Hitt almenna hevði eisini á annan hátt boð eftir honum. Hann sat í mong ár og til sína deyðadag í landbúnaðarkommissiónini og sum búnaðarkønur maður í yvirpolitirættinum."

Mourentius Viðstein skrivar millum annað um Júst:

"Júst var røkin og raskur dugnabóndi, ið var glaður við starv sítt og góður við sítt arbeiði. Hann var av tí rætta gamla slagnum av heiðursmonnum. Hann fylgdi væl við, tá ið umráddi at nýta nýggjari amboð sum at arbeiða við rossi og rossavognum í bønum, sum í hansara tíð var nakað nýtt. Hann var góður við síni arbeiðsross. Hann hevði altíð tvey, tí so hevði hann eitt at skifta við, meðan hitt hvíldi.

**13. December**

Da jeg vaagnede begyndte jeg straks at faa mit Prøvemaaltid, hvilket bestod i 35 gr. Tvebakker og ½ liter The. Siden kom Dr. Hansen ca. en halv Times Tid efter, at jeg var færdig og pumpede mig ud. Det viste sig imidlertid, at Maven var fuldstændig ødelagt, den manglede Saltsyre (Mavesaft). Nu skulde jeg have 20 Draaber Saltsyre blandet med Kinabitter og Vand tre Gange Daglig. "En bitter Sjus" at nyde.

Om Eftermiddagen havde jeg besøg af Ingeborg Lützen, som gav mig en Daase hjemmelavede Brystsukker.

**16. December**

Der var et frygtelig snevejr hele dagen tillige med stærk Frost.

Inna og Andreas Djurhuus blev viede i Kirken af Pastor Dahl. Jeg sendte dem følgende lille "rím":

At Andreas Djurhuus og kona hans Inna
lagaliga munnu lagnuna finna
og liva lívið í gaman og gleði
tað ynskist teimum á brúdleypsdegi.

Inna var dóttir Júst av Húsum. Maður hennara Andreas var ættaður úr Kollafirði. Hann var pápabeiggi Egil Djurhuus, sum var giftur við Mariu f. Christiansen. Sum greitt frá fyrr var mamma Mariu, Katrina, eisini ein av vinunum hjá Egili.

Egil hostaði illa og spýði, og tað var eisini sera kalt. Abbin býr í eini niðaru hædd, men hann kemur javnan upp, og teir fáa eitt prát báðir.

Tann 20. desember skuldi Egil havt verið kannaður av doktor Hansen, men hann var blivin tilkallaður av Velbastað. Men hann kom dagin eftir og staðfesti, at Egil ikki hevði tuberklar. Læknin helt annars, at Egil var betri hesa ferð, og hann tók asperinið frá honum.

**21. December**

Om aftenen havde jeg besøg af Sannegrethe Kjelnæs, (systkinabarn pápan.) Hun havde købt mig et Par sarte Silkehandsker, som jeg skulde have til at give Faster til Jul."

**24. December**

Befandt mig nogenlunde godt hele Dagen igennem. Fik lov af Dr. Hansen til at være oppe fra kl.8-11, da det jo var Juleaften.

Først spiste vi Middag kl godt 8. Siden havde vi et lille Julebord. Fra Johs fik jeg en Nissemand med Confekt og en Guldfyldepen. Fra abba fik jeg fem kroner, ligesaa fra Faster. Senere paa Aftenen kom Sannegrethe herned. Fra hende fik jeg fem Bøger (detektivromaner). Fra Sanna og Poul Kjelnæs fik jeg en Masse Prospektkort tillige med dejlige Kransekager. Da jeg gik i Seng havde jeg kun 38 grader, saa jeg kunde altsaa ikke have faaet nogen Skade af at være oppe i de faa Timer. Saaledes tilbragte jeg Juleaften i Hyggelighed, en rolig og stille Jul.

**Den 25. December**

Befandt mig meget godt hele Dagen. Havde en masse Besøgende. Først havde jeg fra Morgenstunden en fransk visit af Maria Nicolajsen og Mia hjá Demmusi. Om Formiddagen Júst Jacobsen, Jens Evensen og Frue og om Eftermiddagen Pól og Sanna, Karen og Duddan, Sannegrethe Kjælnes, Ing. Jacobsen med Datter og Frue.



Júst á Húsum

*Júst bóndi á Húsum var saman við sínum ættarfólki trúfastir gestir hjá Egili. Teknað av William Heinesen*

**Den 26. December**

Befandt mig nogenlunde godt hele Dagen. Var oppe i to timer og havde en hæftig opkastning. Havde en masse besøg igen i Dag: Jens Mohr med Frue, Søren, Juliane og Albert, Ingeborg Lützen, omma Lüt, Fía á Brúgv (Kjelnæs), Jacob Kjælnes og om Aftenen Sannegrethe Kjælnes, som sad og passiarede med mig "eina góða løtu."

**27. December**

Da det var Alberts "føðingardagur" købte Johs mig en lille ting, som jeg gav ham. Han blev 4 Aar. Albert hevði annnars sama føðingardag sum elsti sonur tann, sum skrivar hetta.

## Nýggjársaftan 1917

Befandt mig nogenlunde godt fra Morgenstunden. Var oppe i to Timers Tid om Eftermiddagen. Havde imidlertid to slemme Opkastninger tilligemed megen Smerte.

Om aftenen havde jeg en fransk Visit af Tofta Jógvan. Ved kl. 10 Tiden holdt Beskytteren Fyrværkeri. Ved kl. 12 Tiden skød han igen med Kanonerne, saa det dundrede efter. Det ligefrem rystede i "heila húsinum".



*Egil saman við vinfólki. Standandi f.v. helst Ellemi Mortensen og Vestina Christiansen, mamma Peter F, og sitandi helst Nancy Svendsen*